

## Ósemja um fiskaútflutning

Nýggja stjórnin í Íslandi hevur sett sær fyri at fremja tiltøk, sum skulu forða fyri, at ov nógvur fiskur fer óviðgjørdur av landinum. Málið hjá stjórnini er, at fiskur, sum verður veiddur undir Íslandi, skal virkast í Íslandi, tí tað fer at geva fleiri arbeiðspláss. Jón Bjarnason, fiskimálaráðharri, dugir ikki at siga, hvørji tiltøk verða sett í verk, tí tað hevur stjórnin ikki avgjørt enn, sigur hann. Sævar Gunnarsson, sum er formaður í íslendska sjómannasambandinum, er ímóti tiltøkum, sum skulu avmarka møguleikarnar at selja fiskin uttanlands, tí tað merkir minni úrtøka til fiskimenninar, sigur hann við Morgunblaðið.

# Sluppu ikki við Smyrli

**Tá Smyril hóskvøldið fór til Suðuroyar, stóðu 50 bilar eftir á bryggjuni í Havn**

SAMFERÐSLA

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*


*Umborð á Smyrli hóskvøldið*

Tað hendir meir enn so, serliga tá høgtíðir eru, at Smyril er ov lítil. Hóskvøldið stóðu 50 bilar eftir á bryggjuni, tá Smyril fór til Suðuroyar.

Fólk, ið vóru við, hava harmast um, at eftir teirra tykki var ov illa stúvað, og eina hillin til bilar fekst ikki niður, tí bingjur og farmabilar tóku ov nógv pláss.

Men hóast hendingin er óheppin, og ikki eindømi, so er ikki nógv at gera við hetta.

- Hatta er ikki fyrstu ferð, og neyvan síðstu ferð heldur, men tað er soleiðis, at frakt og farmur hevur fyrsta rætt. Tað stendur skrivað, og hesum treytum mugu vit arbeiða undir, sigur Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari á Strandferðsluni, sum beinanvegin kannaði málið, tá vit fregnaðust.

- Tað er so, at manningin beyð sær til at koyra bilarnar umborð í fríggjamorgun, og fáa teir suður, um fólkini komu suður hóskvøld. Og manningin koyrdi eini 20 bilar umborð í fríggjamorgunin, og hetta er bert ein eyka tænasta, sigur Conrad G. Joensen.

- Tað hendir, at fólk standa í bíðirøð í langa tíð, men mugu síggja farmabilar fara framum, og so sleppa tey at enda ikki við. Sama er galdandi á leiðini um Skopunarfjørð. Men hesum treytunum arbeiða vit undir, og skulu broytingar gerast, so má Vinnumálráðið uppí, sigur rakstrarleiðarin, sum leggur afturat, at tey á SSL hava arbeitt við ymsum ætlanum viðvíkjandi farmi, men at onki enn er ítøkiligt.



## Vagn Foldbo nýggjur skúlastjóri settur í Fuglafjarðar skúla

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, hevur sett Vagn Foldbo sum skúlastjóra í Fuglafjarðar skúla.

Vagn er 39 ára gamal og hevur starvast bæði sum lærari og leiðari í fólkaskúlanum. Hann varð settur í starv sum lærari í Eiðis skúla í august 1996 og var í hesum starvi í tvey ár, tá hann varð settur sum skúlaleiðari í sama skúla. Vagn var fyristilærari í Eiðis skúla til 2004, tá hann fór í leiðarastarv sum aðalskrivari hjá Heimamissiónini. Skúlaárið 2008/09 hevur Vagn verið lærari í Hornslet skúla í Jyllandi.

Vagn hevur læraraútbúgving og hevur nomið sær eftirútbúgving í leiðslu. Hann hevur tikið útbúgving í persónligari leiðslumenning, sum Mentamálaráðið hevur skipað fyri og diplomleiðaraútbúgving á Føroya Handilsskúla umframt onnur styttri skeið innan leiðslu. Eisini er Vagn í holt við masterútbúgving á Århus Universiteti, har hann lesur ”master í etik og værdier i organisationer”.

Harumframt hevur Vagn verið limur í nevndini í Skúlaleiðarafelag Føroya og seinni skrivari hjá felagnum.

Vagn Foldbo tekur við starvinum 1. august 2009.

# Aleqa Hammond bjóðar Hans Enoksen av

**Í Grønlandi heldur Hans Enoksen fast um, at hann er landsstýrisformansevni hjá Siumut, nú val stendur fyri durum, men Aleqa Hammond, fyrrverandi fíggjarmálaráðharri, sigur, at hon hevur betri hegni til at tryggja, at politikkurin hjá landsstýrinum kann halda fram**

GRØNLAND

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Aleqa Hammond bjóðar Hans Enoksen av. Á landsfundinum hjá Siumut í fjør stillaði hon upp ímóti Hans Enoksen sum floksformanni, men tapti valið. Hetta er heldur ikki fyrstu ferð, at stríð ella kapping er um sessin sum formaður í landsstýrinum, tí undan valinum fyri fýra árum síðani kunngjørdi Lars Emil Johansen, at hann ætlaði sær formanssessin. Men so varð ikki.

Hans Enoksen sigur við grønlendska kringvarpið KNR, at í teimum broytingartíðum, sum Grønland er í, noyðist landsins leiðslan javnan at taka avgerðir, sum ikki fella í góða jørð allastaðni. Tí skilir hann væl, at onkur hevur hug at finnast at sær. Eisini floksfelagar. Hann ásannar, at tað eru bólkar og ymsar áskoðanir í Siumut, men at tað er ikki annað enn í øðrum flokkum.

-Og so er tað okkara styrki, at so nógvir førleikasterkir limir taka lut í orðaskiftinum, sigur Hans Enoksen, sum samstundis kann vísa á, at floksleiðslan í Siumut hevur ikki sett spurnartekin við hansara formansstarv.

### Veljararnir vilja tað

Hóast hon fekk umleið 200 atkvøður færri enn Hans Enoksen á formansvalinum í Siumut í fjør, heldur Aleqa Hammond ikki, at allar súður eru syftar, og hon er sannførd um, at hon er betur egnað enn formaðurin til at standa á odda fyri einarum miðvísum politikki. Í hesum sambandi vísir hon til eina meiningakanning herfyri, sum vísti, at fleiri veljarar vilja hava hana til formann í landsstýrinum.

Í fjør fór Aleqa Hammond úr starvinum sum landsstýrismaður í fíggjarmálum, tí hon fekk ikki undirtøku fyri sínum búskaparpolitikki. Í dag sigur hon, at tíðin hevur víst, at hon hevði rætt tá, og at tað hevur sannført hana um, hvussu umráðandi tað er hjá einum landsstýri at halda ta settu kósina. Eins og Hans Enoksen heldur hon tað vera eina styrki fyri flokkin, at fleiri eru um boðið.

-Tað vísir styrki, at flokkurin hevur fleiri, sum eru til reiðar at taka róðrið, um høvið býðst. Vit eru samd um tey grundleggjandi málini, men eg havi valt at bjóða meg fram, tí ein meiningakanning hevur víst, at fólk vilja hava meg, sigur hon við KNR.


*Hans Enoksen heldur seg hava røkt formansstarvið í landsstýrinum so mikið væl, at hann eigur at halda fram*

(Mynd: KNR)


*Hóast hon tapti formansvalið í Siumut í fjør, bjóðar Aleqa Hammond formanninum av eina ferð enn*

(Mynd: KNR)